# Ársroknskapur

## hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri 2003

| (1.000 kr) | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| **RAKSTRARROKNSKAPUR** | | |
| Inngjøld | 68.463 | *142.758* |
| Útgjøld v.m. | -69.286 | *-52.910* |
| **Tekniskt úrslit** | **-823** | ***89.848*** |
| Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | -10.585 | *-11.044* |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **-11.408** | ***78.804*** |
| Avskrivingar | -851 | *-923* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-12.259** | ***77.881*** |
| Fíggjarpostar, netto | 18.246 | *29.015* |
| **Rakstrarúrslit** | **5.987** | ***106.896*** |
| **FÍGGJARSTØÐA pr. 31. desember** | | |
| **Aktiv** | | |
| **Støðisfæ íalt** | **585** | ***990*** |
| Tíðaravmarkingar og forútgoldið | 16 | *14* |
| Skuldarar | 1.089 | *2.765* |
| Lánsbrøv | 432.555 | *415.216* |
| Tøkur peningur | 64.791 | *72.371* |
| **Umferðarfæ íalt** | **498.451** | ***490.366*** |
| **Aktiv íalt** | **499.036** | ***491.356*** |
| **Passiv** | | |
| Stovnsfæ | 93.840 | *93.840* |
| At flyta til komandi ár | 393.866 | *387.879* |
| **Eginogn íalt** | **487.706** | ***481.719*** |
| Skyldugur arbeiðsloysisstuðul | 3.529 | *2.328* |
| Ognarar | 905 | *817* |
| Onnur skuld | 6.850 | *6.200* |
| Tíðaravmarkingar | 46 | *292* |
| **Skuld íalt** | **11.330** | ***9.637*** |
| **Passiv íalt** | **499.036** | ***491.356*** |

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Faks 349551
als@als.fo • www.als.fo






# Móttøka


*Vagn Foldbo*


*Tom Skaale*

Høvuðsstýrið fyri Kirkjuligu Heimamissiónina bjóðar til móttøku í Leguhúsinum í Nesvík fyri fráfarna og nýggja aðalskrivaran **týsdagin 2. mars kl. 16.00 - 18.00**. Henda dag siga vit Tom Skaale takk fyri árini í aðalskrivarastólinum og bjóða Vagn Foldbo vælkomnum í hansara stað. Tað hevði glett Høvuðsstýrið at sæð umframt starvsfólkið hjá Heimamissiónini landsnevndarlimir, stýrislimir og HM-vinir eins og viðskiftafólk hjá Heimamissiónini um landið alt. Lat okkum gera dagin minnisríkan fyri Tom Skaale og Vagn Foldbo og teirra kæru.

Høvuðsstýrið fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Føroyum






MASKINMEISTARAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund á Hotel Hafnia leygardagin 13. mars kl. 14.

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

ARGJA BÓLTFELAG 1973

## Aðalfundur

Aðalfundur hjá AB verður í AB-húsinum mánakvøldið 1. mars kl. 19.30.
Aftaná verður aðalfundur hjá AB-stuðlum.
Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndirnar**









CISV

# Altjóða Barnalegur søkja eftir leiðarum v.m.

Børn og ung fara aftur í summar at luttaka á CISV legum. Børnini liva á legunum, saman við børnum úr nógvum øðrum londum, skapa vinarbond og læra um fólk og mentanir í hinum londunum.

Í ár senda vit 36 børn og ung á legur. Men enn tørvar okkum nakrar leiðarar og ungleiðarar. Harumframt sóknast vit eftir 4 dreingjum og einum leiðara úr Suðuroynni til Interchange leguna.

- **Interchange:** Millum børn úr Suðuroy og ein bý í Finnlandi. Ein bólkur við leiðara og 8 ungum í aldrinum 12-13 ár úr hvørjum landi eru saman í ein mánað. 14 dagar í hvørjum landi.
- **Ungleiðarar:** Til nakrar legur hava vit brúk fyri 16 og 17 ára gomlum ungleiðarum.
- **Leiðarar:** Leiðarar skulu vera í minsta lagi 21 ár. Hava hug og hegni at fáast við børn og ung og duga væl at samstarva við onnur.

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg og vil frætta meira, ert tú vælkomin at ringja til Tóru Tórgarð tlf. 321961 ella 221590 sum skjótast.


# Mercedes Benz Vito



árg. 1999, nýsýnaður, til sølu fyri einans 135.000 v/ mvg.



# MBW 525 TD

árg. 1990, til sølu fyri einans 85.000 v/ mvg. Møguliga kann annar bilur ganga inn í keypið.

**Tlf. 211732/585585**







# SUÐUROYINGAR!!

## KOMIÐ OG SYNGIÐ VIÐ!!

**Leygarkvøldið 28. februar 2004 klokkan 21.00, skipar yngra kvartettin í Betesda Klaksvík fyri evangeliskari sangløtu í**

## ÍTRÓTTARHØLLINI Í TRONGISVÁGI

**Á skránni er:**
**Felagssangur**
**Kvartettsangur**
**Filmbrot**
**Leikur**
**Tala**

**Aftaná verður boðið til kaffi, og onkrum afturvið**

**ØLL eru hjartaliga vælkomin**
**MINST TIL! KL. 21.00**

*Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum.*

***Sálmur 34,9***

mbf

# Limafundur í MBF

Limafundur verður í MBF húsinum **mikudagin 3. mars kl. 19.00,** har Karin Heinesen, sosialráðgevari, heldur fyrilestur, ið hon kallar **»Rehabilitering«.**

Endamálið við rehabilitering er at ganga tørvinum hjá tí einstaka persóninum á møti, soleiðis at hansara møguleikar fyri sjálvur at taka ábyrgd verða styrktir.

*Allir limir eru vælkomnir.*

**Starvsnevndin**

## Skeið til lastbil, buss og trailara

byrjar mánadagin 1. mars kl. 19.00

Tilmelding á tel 318821 ella tel 218777

Spf. KOYRIKORTIÐ
Slættanesgøta 5 • tel 31 88 21 og tel 21 87 77

Sosialurin 341800

# Útbjóðing

**Leggjan av vatn- og kloakkleiðingum á Gadd í Nes Kommunu**

Fyri Nes Kommunu verður arbeiðið at leggja vatn- og kloakkleiðingar hervið boðið út alment.

Arbeiðið verður boðið út sum ein arbeiðstøka:

**1. Jørð-, vatn-, kloakkarbeiði**

Arbeiðið fevnir í stórum um at gera veitir, leggja vatnleiðingar í verandi veg og at fyrireika vatn- og kloakkfrárenningar fyri nýggja útstykking.

Útbjóðingartilfarið fæst frá fríggjadegnum 5. mars við at gjalda kr. 3.000,- í veð á konto 4132607 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi mikudagin tann 3. mars og venda sær til Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Lisitatiónin verður týsdagin 23. mars í ár kl. 14.00 í fundarhølinum á skrivstovuni hjá Nes Kommunu. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**F U G L Ø   A R K I T E K T A R**
Gerðagøta 12, Postsmoga 1
FO-700 Klaksvík
Tlf. 457887 · Fax 457897
fuglark@fuglark.fo